# Nýggj svimjihøll

November 2011



# Innleiðing

Havnar Svimjifelag vil við hesum uppriti, varpa ljós á tørv og møguleikar sum eru fyri svimjingini í Tórshavn. Uppritið er eitt íkast til fyrireikingarnar at víðka um karmarnar fyri svimjingina í høvuðsstaðnum.

Uppritið er eitt framhald av brævi, Havnar Svimjifelag (HS) sendi býráðnum herfyri. HS vil við hesum uppriti peika á teir møguleikar, sum eru í verkætlanini. Somuleiðis verður farið inn á tær fortreytir, sum HS sær fyri sær eru galdandi fyri eina tílíka verkætlan.

Í uppritinum verður komið inn á hesi evnir:

- Verandi og framtíðar tørvur
- Staðseting
- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting

Arbeiðsbólkurin hevur verið mannaður av:

- Eyðun Húsgarð
  formaður Havnar Svimjifelag
- Erling Ejdesgaard
  næstformaður Havnar Svimjifelag
- Óli Gardshodn
  nevndarlimur Havnar Svimjifelag
- Rúni Abrahamsen
  arkitektur

# Søgan

## Søgan

Fyrstu prógvini at fólk hava svomið, finnast í málningum, sum stava frá steinøldini, Tað er tó ikki fyrr enn fyri 200 árum síðani at fyrstu kappingarnar í svimjing vóru í Evropa. Og fyri 100 árum síðani, vóru svimjikappingar á Eystaruvág á ólavsøku. Almenningurin svam fyri tað mesta í áarhyljum og á sjónum.

Fyrsti svimjihylurin í Havn, var gjørdur í Gundadali í 1932. Har kundi almenningurin svimja, og har kundi kappast á stuttum teinum. Kappingar á longri teinum vóru enn á sjónum. 27 ár seinni var annar svimjihylurin bygdur í Gundadali og stóð liðugur í 1959. Hetta var eitt stórt framstig sum vaks um áhugan at svimja, men skjótt gjørdist greitt at betri umstøður máttu fáast til vega. 24 ár seinni var núverandi svimjihøllin liðug í 1983. Tað eru 28 ár liðin síðani at verandi svimjihøll var liðug og tíðin er komin til at dagføra umstøðurnar hjá svimjingini í Tórshavn í tráð við samfelagið og tann veruleika vit liva í. Tað eru skjótt 30 árini sum eru gingin síðani síðstu dagføring.

Havnar Svimjifelag, sum er eitt av stóru feløgunum í Tórshavn er stovnað í 1938 og hevur 600 limir

# Støðan

## Støðan í dag

Svimjihøllin í Gundadali stendur í dag sum ein varði fyri framskygni, hóast verkætlanin í sínari tíð kostaði politikarum politiska lívið. Góðu karmarnir og staðsetingin í Gundadali hevur gjørt at svimjihøllin er um at kódna í egnari succes. Úrvalssvimjarnir eru tey føroysku ítróttarfólkini, sum hava størstu ítróttarligu í altjóða høpi. Fólk hava eisini fingið eyguni upp fyri at tað er gott at røra seg við at svimja. Tað eru ikki øll, sum kunnu ganga til fimleik, ella brúka Tórsbreyt. Fyri tey er svimjihøllin besta alternativið og hetta fer bara at vaksa í talið.

Svimjarar í Havnar Svimjifelag og almenningurin hava kunnað svomið lið um lið. Hesi seinastu árini eru báðir málbólkarnir vorðnir størri og sampakkar tað illa longur at hava teir svimjandi lið um lið. Tíðin er komin til, at báðir partar fáa betri umstøður, almenningurin og úrvalssvimjarin

## Limir og almenningurin

Tað eru 600 limir í Havnar Svimjifelag. Hetta talið hevði óivað verið tað dupulta ella meira um umstøðurnar høvdu verið tilstaðar. Tað eru nógv, sum standa á bíðilista meðan onnur als ikki bjóða uppá at sleppa framat.

Tað eru 160.000 vitjandi í svimjihøllini um árið. Harumframt koma eitt stórt tal av brúkarum frá skúlum, feløgum o.o.

Hetta gevur í meðal 4-5.000 vitjandi um vikuna. Sum skilst er hetta eisini tað dupulta av hvat vit síggja aðrastaðni í líknandi svimjihallum

# Framtíðin

## Framtíðin

Svimjing er gott fyri fólkaheilsuna er greitt. Almenningurin hevur ikki nóg nógvar tíðir, tí feløg og skúlar skulu eisini hava plássi. Um tað var meira "vatn" at svimja í, hevði ikki bara verið betri pláss, men tað hevði eisini verið møguligt at skipa fyri  fleiri tiltøk. Tað hevði borið til at havt almenning og úrvalssvimjarar í senn, Tað hevði eisini borið til at havt fleiri tilboð eitt nú við ymsum tema: okkurt fyri pensionistar, annað fyri ungdómar, barnafamiljur, børn o.s.fr.

Hugsið tykkum eitt ungdómstiltak í hylinum eitt leygarkvøld. Poolparty, DJ show, dansur og svimjing. Diskoljós og tónleikur sum passar teimum ungu,  har tey ungu kundu møtast sum eitt rúsfrítt alternativ.

Ella:

Eitt Wellnesskvøld, har tað er borðreitt við onkrum leskiligum og onkrum afturvið. Livandi ljós fram við kantinum og róligur tónleikur, meðan tú tekur nakrar longdir uttan at verða órógvaður av úrvalssvimjarum, sum venja til komandi HM

Møguleikarnir eru nógvir, um nøgdin av vatni verður ferfaldað.  Almenningurin kann brúka hylin allan dagin. Feløgini kunnu brúka tá tey hava brúk fyri tí.

Uppskot hevur verið frammi um byggja ein "terapi hyl", eitt nú fyri giktasjúk. Tað hevur eisini verið frammi at gera einar 2-3 heitar pottar. Ætlanirnar er, at hetta skal byggjast móti ÍSF húsinum. Tankar hava eisini verið frammi um at gera eitt baðiland við skreiðibreyt o.l. Uppskot um hetta fyriliggja og er tað ætlað at verða bygt út eystureftir

## 1. Framtíðar kappingar

Flestu altjóða kappingar, sum kunnu hugsast koma til Føroyar kunnu verða á stuttbana, eisini Norðurlendsk juniormeistarakappingin og oyggjaleikir.

Fyrst og fremst snýr ein 50 m hylur um at økja um nøgdina av vatni, soleiðis at almenningur og feløg hava betri møguleikar at svimja og røra seg. Í øðrum lagi snýr tað seg um at betra um venjingarumstøðurnar hjá úrvalssvimjarnum,at tey eisini kunnu svimja í einum 50 m hyli í Føroyum, sum er ein fyritreyt um tú vilt gera teg galdandi í altjóða høpi



# Loysnin



Fyri Havnar Svimjifelag er loysnin ein 50 m hylur við 10 geilum. Hetta økir vatnnøgdina 3-4 ferðir og gevur eitt rásarúm ikki bara fyri felagið, men fyri allan býin, sum helst eisini røkkur 25 ár fram í tíðina

Felagið sær tað sum bestu loysn at leggja ein 50 m hyl við síðuna av verandi svimjihøll í Gundadali. Hetta verður grundgivið við, at Gundadalur er miðdepilin fyri alla ítróttina í Tórshavn. Ein tilbygging ger at fleiri av teimum verandi funktiónunum kunnu endurnýtast, bæði hvat fasilitetum og starvsfólkum viðvíkur. Hetta er galdandi fyri eitt nú parkeringsøki, komuviðurskifti, atgongumerkjasølu, skiftirúm, brúsur, hitarúm, kaffistovu og umsiting, ið alt uttan stórvegis kostnað kann tillagast til at taka ímóti fleiri vitjandi. Tað er eisini ein fyrimunur, at førleikin at reka eina svimjihøll er á einum staðið. Stórdriftsfyrimunur eru eisini at fáa eygað á í rakstri og innkeypi.

Ein tilbygging ger, at virksemið og møguleikarnir eru nógv størri og ger brúkið meira liðiligt.

Íløgan fer at síggjast aftur í frískum og væl nøgdum borgarum. Eisini kunna vit bjóða útlendskari svmjielitu til viðkomandi kappingar á heimavølli.

# Fortreytir

Fortreytir fyri verkætlanini er, at bygdur verður ein 50m hylur vestanfyri verandi svimjihøll, har sum ÍSF húsið er í dag. 50 m hylurin er í sjálvstøðugum bygningi fyri seg, sum verður bundin saman við verandi høll við eini gongd. Terapihylur, pottar og baðiland eru ikki við í hesi verkætlan, men mugu samskipast við langhyljarverkætlanina og byggjast antin samstundis ella í seinni stigum.

Hitaskipanin til langhylin er nýggj og sjálvstøðug orkuskipan, sum í seinni stigi leggur upp til møguliga íbinding í fjarhita, ið væntandi verður lagdur oman eftir Sundsvegnum. Somuleiðis eru sjálvstøðug reinsiskipan, ventilatión og felagshølir til eitt nú Havnar Svimjifelag partur av verkætlanini. (sí hølisskrá)"



# Hølisyvirlit

Í hølisyvirlitinum er roknað við teimum fermetrunum, sum skulu til, fyri at svimjihøllin verða vælvirkandi svimjihøll. Tað er ikki roknað við at høllin skal rúma tí stóra áskoðaratalinum, tí tað verður ikki mett at verða tað týdningarmesta. Í seinastuni hava kappingarnar verið sjónvarpaðar og hevur hetta eydnast sera væl.

Havnar Svimjifelag roknar ikki við at tað er neyðugt við tí stóra áskoðaratalinum og er av tí áskoðan, at nøkur røð fram við kantinum eru nøktandi fyri felagið. Pláss er fyri eini 200-300 áskoðarum.

| | | m² | m² | m² |
|---|---|---|---|---|
| **Svimjihøll** | | netto | brutto | |
| | Hylur og gólv rundanum | 1.798 | 1.860 | |
| | Venjingarhøli (styrkivenjing) | 60 | 65 | |
| | Goymsla | 15 | 16 | |
| | Gongd | 20 | 22 | |
| **Tilsamans** | | | | **2.257** |
| | | | | |
| **Tøkni** | | | | |
| | Ventilatión | 50 | 54 | |
| | Reinsiverk | 50 | 54 | |
| **Tilsamans** | | | | **108** |
| | | | | |
| **Felagshøli** | | | | |
| | skrivstova | 12 | 13 | |
| | Fundarhøli | 25 | 27 | |
| | Tekøkur | 5 | 5 | |
| | Vesi | 3 | 3 | |
| | Goymsla | 5 | 5 | |
| **Tilsamans** | | | | **54** |
| | | | | |
| **Svimjihøll tilsamans** | | | | **2.419** |

# Kostnaður

Svimjihallir eru lutfalsliga bíligari at byggja í dag enn fyri 30 árum síðani. Svimjihøllin í Gundadali er dygdargóð bygging, bæði í tilfari og arkitekturi. Tað er umráðandi at dygdarstøði er gott og kann liva upp til verandi bygging.

Svimjihylar kunnu keypast sum"lidnar loysnir" bert at seta upp. Tað er tó eitt kent fyribrygdi at tær sokallaður "Turn-key" loysnirnar ikki taka hædd fyri serføroysk viðurskiftir, eitt nú veður og vindur. Harvið er ikki sagt at hesar ikki kunnu brúkast sum partsveitingar, serliga har tað er talan um serinnleggingar og serveitingar.

Prísurin fyri eina nýggja lidna svimjihøll, írkoknað umbygginar av verandi, verður mett at kosta 35 mio kr

Í metingini er ikki roknað við terapihyli, pottum og baðilandi.

Byggikostnaður íroknað ráðgeving, eftirlit, byggileiðslu og ókent:

**42.000.000 kr**

# Tíðarætlan



- Byggiskrá		2 mdr
- Projektering	6 mdr
- Atbjóðing		2 mdr
- Útinning		12 mdr
- Tils			22 mdr (2 ár)

**Um farið verður til verka beinanvegin, kann spakin longu setast í 1. oktober 2012**

# Økið

Sambært byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, liggur økið í umráðisparti D2, sum verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Verkætlanin skal samskipast og góðkennast av Tórshavnar kommunu

ÍSF húsið, sum stendur í vegin fyri eini útbygging skal onkursvegna kompenserast, antin fíggjarliga ella við útvegan av tilsvarandi hølum. ÍSF húsið er umleið 265m$^{2.}$ Eitt “eittplans” hús” við lofti.

Kommunan hevur nógvar ætlanir fyri ítróttarøkið og eiga hesar at verða samskipaðar, soleiðis at Gundadalur er ein heild eftir einari yvirskipaðari ætlan.

## Vegir og parkeringspláss

Atkoman verður ikki broytt, men verður eftir Hoydalsvegnum. Parkeringsplássið verður útbygt.

Kravið til parkeringspláss smb. byggisamtyktini er, tá nýggja svimjihøllin er liðug, 105 parkeringspláss. Tað eru 70 parkeringspláss til svimjihøllina. Tað skulu sostatt útvegast 35 parkeringspláss til svimjihøllina afturat um byggideildin krevur tað. Her kann tó vísast til parkeringspláss í grannalagnum, t.d. við Tórsvøll, Nabb, Tórsbreyt og Ovara vøll.

